Ár 2010, hin 23. mars

**24.**

**10/00262 Farloyvi frá býráðsarbeiðnum, 12. – 31. mars 2010 – Eyðgunn J. Samuelsen**

Í skrivi 12. mars 2010 søkir Eyðgunn J. Samuelsen, býráðslimur, um farloyvi frá býráðsarbeiðnum frá 12. til 31. mars vegna løgtingsarbeiði, og at næsti persónur á javnaðarlistanum tekur sætið.

Næsti persónur á javnaðarlistanum er Signhild V. Joensen, ið sostatt tekur sæti í býráðnum í farloyvistíðarskeiðnum.

**Býráðsins samtykt:** Samtykt, og Signhild V. Joensen tók sæti í býráðnum.

**25.**

**09/00794 Eldsløkkiavtalur við grannakommunur – BRL**

Samskifti hevur í eina tíð verið millum Viðareiðis, Hvannasunds og Klaksvíkar kommununur um at seta í verk eitt formligt samstarv á hesum øki, og nú er komið fram til eitt uppskot til avtalu, sum verður lagt fyri til góðkenningar.

Fíggjarnevndin hevur á fundi 17. mars 2010 samtykt, at nevndin tekur undir við fyriliggjandi uppskoti til samstarvsavtalu um eldsløkking millum Klaksvíkar, Viðareiðis og Hvannasunds kommunur, dagfest 16. mars 2010, sum verður sent Brunanevndini og Teknisku Nevnd til góðkenningar áðrenn býráðsfundin.

**Býráðsins samtykt:** Tilmælið samtykt.

**26.**

**09/00286 Gjald fyri brúksvatn – 2. viðgerð/samtykt**

Málið varð samtykt fyrru ferð av býráðnum 23. feb. 2010.

Fíggjarnevndin tekur undir við býráðssamtyktini 23.02.2010 og sendir málið til býráðið til aðru samtykt.

**Býráðsins samtykt:** Tilmælið samtykt 2. ferð.

**27.**

**2007-09-035 Spillvatnsætlan – 2. viðgerð/samtykt**

Málið varð samtykt fyrru ferð av býráðnum 23. feb. 2010.

Fíggjarnevndin tekur undir við býráðssamtyktini 23.02.2010 og sendir málið til býráðið til aðru samtykt.

**Býráðsins samtykt:** Tilmælið samtykt 2. ferð.

**29.**

**10/00160 Ferðslunevndarheimildir**

Í sambandi við tað dagliga arbeiðið í og uttan um Teknisku Nevnd og Ferðslunevndina er íkomin eitt sindur av iva um, hvørjar heimildir Ferðslunevndin hevur, og hevur umsitingin út frá hesum gjørt eitt uppskot til formliga "reglugerð fyri virksemi og heimildir hjá Ferðslunevndini", har heimildirnar hjá nevndini verða útgreinaðar. Sí skriv frá umsitingini, dagfest 4. mars 2010.

Ferðslunevndin mælir hin 9. mars til, at §4 verður víðkað við: "ferðásetingum við skeltum, vegbungum o.líkn.". §5 verður skerd við: "so sum vegbungur".

Tekniska Nevnd tekur 9. mars undir við reglugerðini, men at broytingaruppskot frá FeN í §4 "ferðáseting, vegbungum o.líkn." skal viðgerast av býráðnum. Tekniska Nevnd viðtók á fundi 16. mars, at staðseting av vegbungum liggur hjá FeN, og at TN skal kunnast so hvørt.

Fíggjarnevndin mælir hin 17. mars býráðnum til at taka undir við fyriliggjandi uppskoti til "Reglugerð fyri virksemi og heimildir hjá Ferðslunevndini" við teimum broytingum, at "vegbungur" verða fluttar frá §5 til §4, tvs. at FeN tekur sjálvstøðuga avgerð um tey málini, sum TN verður kunnað um, og at "ferðtálman" verður tikið við í §5 í reglugerðini.

**Býráðsins samtykt:** Tilmælið frá FíN samtykt.

**30.**

**09/00283 Reglugerð fyri bátapláss á landi - broyting**

Í november 2009 samtyktu Havna- og Vinnunevndin og Fíggjarnevndin eina dagføring av §5 í reglugerðini fyri bátapláss á landi. Broytingin er hendan: Gjaldið fyri at hava bátar standandi á økinum hjá Klaksvíkar Havn er kr. 100 pr. dag, tó eru teir fyrstu 21 dagarnir ókeypis.
Tekniska Umsiting mælir nevndum og býráði at taka undir við broyttu reglugerðini.

Havna- og Vinnunevndi á fundi 9. mars undir við tilmæli frá TU 03.03.2010.

Fíggjarnevndin tekur hin 17. mars undir við Havna- og Vinnunevndini 09.03.2010.

**Býráðsins samtykt:** Tilmælið samtykt.

**31.**

**10/00182 Marknaumskipan – matr. nr. 144m og 156a – Umhvørvisstovan**

Talan er um upprætting av marki millum grannar. Við umskipanini verður samsvar millum matrikulmark og stoyptan garð á staðnum. Tekniska Umsiting mælir til at játta umsóknini.

Tekniska Nevnd tekur á fundi 9. mars undir við tilmælinum frá TU 04.03.2010.

**Býráðsins samtykt:** Tilmælið samtykt.

**32.**

**10/00229 Íbúðir til menningartarnað**

Sosiald Deild býráðsins hevur gjørt eitt upprit við frágreiðing um gongdina í málinum higartil og eitt uppskot til víðari tilgongd við tí endamáli at útvega bústaðamøguleikar til menningartarnað. Sí skriv, dagfest 2. mars 2010, har mælt verður til, at kommunan tekur samband við Almannamálaráðið at skunda undir eina landsalmenna bygging, og í øðrum lagi, at umsitingin fær heimild at arbeiða víðari við stovnseting av sjálvsognarstovni, sum sjálvstøðugt skal byggja, eiga og reka hesar bústaðir.

Sosiala Nevnd heitir hin 10. mars á umsitingina um at arbeiða víðari við málinum. Tó loyvir SoN ikki, at stovnaður verður ein sjálvsognarstovnur.

Fíggjarnevndin tekur hin 17. mars undir við Sosialu Nevnd viðvíkjandi víðari tilgongdini, og at spurningurin um bygnaðin verður tikin uppaftur seinni.

**Býráðsins samtykt:** Tilmælið frá FíN samtykt.

**Fundurin lokin**